# Vevkamera á eystanstevnu

**Á heimasíðuni hjá Runavíkar Kommunu verður vevkamera sett upp til eystan stevnuna**

STEVNA
*Ingrid Bjarnastein*

**Runavík:** Runavíkar kommuna fer á heimasíðuni hjá sær at bjóða øllum, sum hava hug at síggja, hvat gongur fyri seg á eystanstevnu. Har verður nevniliga eitt vevkamera sett upp, soleiðis, at tey, ið hava internetsamband, kunnu síggja, hvat hendir á torginum í Runavík.

Hetta varð roynt til Fish-Fair stevnuna fyri stuttari tíð síðani, og sigur Rodmundur Nielsen, borgarstjóri, at heimasíðan hevur ongantíð havt so nógvar vitjanir sum tá.

Heimasíðan hjá Runavíkar kommunu er at finna á www.runavik.fo



# 59.000 krónur fyri 26 km



*Soleiðis sá út á norðoyastevnu. Eysturoyingur róði tó ikki kapp seinasta vikuskiftið. Tá var talan um stuðulsrógving, har tíggjumannafarið megnaði at fáa 27.000 krónur inn. Tilsaman fekk kappróðrarfelagið knappar 60.000 krónur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Kappróðrarfelagið NSÍ skipaði seinasta vikuskiftið fyri síni fyrstu stuðulsrógving, og inn komu 59.000 krónur. Felagið hugsar um at keypa tveir nýggjar bátar**

RÓGVING
*Ingrid Bjarnastein*

**Runavík:**
Seinasta vikuskiftið varð skipað fyri stuðulsrógving á eystara armi á Skálafjørðinum. Kappróðrarfelagið NSÍ hevði sína fyrstu stuðulsrógving, og inn kom heilt fitt av peningi.

Fimm bátar róðu tilsamans 26 kilometrar, og fingu av hesum 26 kilometrunum 59.000 krónur inn. Harav fekk Eysturoyingur góðar 27.000 krónur inn.

Kappróðrarfelagið hugsar um at endurnýggja allan róðrarflotan, men fyrst verður talan um tveir nýggjar bátar. Tað verða Spógvin og Heiðabáturin, sum verða skiftir út fyrst.

Aftaná stuðulsrógvingina leygardagin varð borðreitt við suppu til róðrarfólkið, og dysturin millum Ísland og Føroyar varð vístur á stórskíggja, so øll fingu eina hugnaliga løtu saman.

Kappróðrarfelagið NSÍ ynskir at takka øllum hjartaliga fyri stuðulin.

Krosstein www.krosstein.fo

Pf. Svend

**Handilslærlingur**

Hevur tú hug at útbúgva teg innan sølu av tilfari til hitaverk, sanitet, baðirúmsútbúnað og líknandi, hava vit í dag eitt lærupláss leyst at søkja.

Tú kemur at arbeiða innan øll økir í sølulønum í fyritøkuni, so sum goymsluarbeiði, avgreiðsla og vegleiðing av kundum, útrokning av tilboðum og innkeyp við meira. Arbeiðstíðin er 8 - 17.

Eftir lokna lærutíð eru góðir møguleikar fyri framhaldandi arbeiði. Eisini gevur henda útbúgvingin góðar møguleikar fyri víðari útbúgving á mongum økjum.

Hevur tú FHS er lærutíðin 3 ár, og byrjunarlønin 8.176,90 kr. um mánaðin, og hevur tú HH er lærutíðin 2 ár, og byrjunarlønin 8.994,59 um mánaðin.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja til okkara, og spyrja eftir Svend Krosstein.

Hevur hetta tín áhuga, so send okkum eina umsókn saman við prógvum og viðmælum. Næmingar ið taka prógv í summar, eru eisini vælkomnir at søkja.

P/F Svend Krosstein
Falkavegur 6
Postboks 3229
Fo-110 Tórshavn

VHS Alt tilfar til VATN - HITAVERK - SANITET - VENTILATIÓN

Falkavegur 6 · FO-110 Tórshavn
Tel. 34 46 00 · Fax. 34 46 01
E-mail: krosstein@krosstein.fo

Lesið Sosialin

*FØROYA BANKI*
*lækkar rentuna*

Tann 6. juni 2003 lækkaði Danski Tjóðbankin diskontoina við 0,5 pst. niður í 2 pst. p.a. Sum avleiðing av hesum javnar FØROYA BANKI rentustig síni við gildi frá 14. juni 2003.

Rentustigini á útlánum og kredittum verða lækkað við 0,25 - 0,375 pst. Rentan á sethúsalánum við 1. veðrætti verður eftir hetta 4,25 pst. uttan mun til lánisnið.

Fyri bústaðarlán verður rentan sostatt:

| | |
|---|---|
| **1. veðrættur** | 4,25 % |
| Onnur bústaðarlán | 7,00 % - 8,00 % |

Rentan á billánum verður:

| | |
|---|---|
| Billán - útgjald 40% | 5,25 % |
| Billán - útgjald 25% | 6,25 % |
| Brúktir bilar | 7,25 % |

Rentan á innlánum uttan uppsøgn verður óbroytt. Viðvíkjandi innlánum við serligum treytum verður rentan lækkað við 0,5 pst., meðan rentan á innlánum við uppsøgn (3 mðr) einans verður lækkað við 0,25 pst.

**Innlán við uppsøgn:**

| | |
|---|---|
| Saldo 0 - 100 tkr. | 1,50 % |
| 100 - 300 tkr. | 1,75 % |
| 300 - 1000 tkr. | 2,00 % |
| 1000 - | 2,25 % |

| | |
|---|---|
| Nósakonto | 2,00 % |
| Nýtslu-KontoIN | 0,75 % |
| Uppsparingar-KontoIN | 2,00 % |
| Bústaðarkonto (+ 3% í stuðli) | 2,00 % |
| 60-ára konto / Ratukonto | 2,50 % |

FØROYA BANKI



# Fjarðastevnan fyri fyrstu ferð



*Anfinn Gærdum, formaður í Stráluni, heldur, at ein FM-stevna hevur stóran týdning bæði fyri bygdina og fyri ítróttarfeløgini á Strondum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Nú um vikuskiftið er Fjarðastevnan farin av bakkastokki fyri fyrstu ferð. Stevnan skal skifta ímillum Strendur, Skála og Vestmanna, og fyrsta stevnan verður hildin á Strondum. – Tað er ógvuliga týdningarmikið fíggjarliga fyri feløgini at hava eina stevnu. Soleiðis ber til at savna nógvan pening uppá eit vikuskifti, sigur Anfinn Gærdum, sum er formaður í Stráluni**

STEVNA
*Ingrid Bjarnastein*

Strendur: Í kjallaranum í bygdarhúsinum á Strondum heldur Strálan til. Strálan, er sum flest øll vita, kappróðrarfelagið hjá vestara armi á Skálafjørðinum.

Inni í kjallararúminum standa fleiri borð við stólum. Eitt stórt sjónvarp við parabolkassum, dvd-spælara og øðrum góðum stendur innast. Fleiri plakatir og myndir hanga á vegginum og á borðinum liggja kortspøl.

Rúmið ber bráð av aktiviteti. Tað luktar av ungdómi, og sum vit standa og eygleiða tær ymsu myndirnar, ger hann eina mikrofon klára. Hann er Anfinn Gærdum, formaður í Stráluni.

## Stutt skotbráð

Fjarðastevnan stendur fyri durum. Og hetta er fyrstu ferð at henda stevnan er á skránni. Talan er um eina FM-stevnu, sum skal skiftast ímillum tær báðar stóru bygdirnar á vestara armi á Skálafjørðinum og síðani eisini Vestmanna.

Fyrsta fjarðastevnan verður á Strondum, og tað eru Strálan og StÍF, sum skipa fyri stevnuni.

Anfinn Gærdum, formaður í Stráluni er ein av teimum mongu fyriskiparunum, og hann hevur seinastu dagarnar havt nógv um oyruni.

– Vit hava bara havt tríggjar vikur at fyrireika stevnuna í, so ein kann siga, at skotbráðið hevur verið ógvuliga stutt. Eg taki mær mest av kappróðrinum og dansinum. Vit hava sett eina nevnd við einum góðum samkipara at taka sær av stevnuni, greiðir Anfinn Gærdum frá.

Nógvar kreftir skulu til fyri at stápla eina stevnu uppá beinini, so rokast hevur verið nógv seinastu tríggjar vikurnar. Nógv ymiskt spennandi er á skránni.

– Ein FM-stevna hevur nógv at siga fyri tvær slíkar miðalstórar bygdir, sigur Anfinn.

Ein onnur stevna er eisini á skránni hetta vikuskiftið, og hon er hinumegin fjørðin. Eystanstevnan.

Formaðurin í Stráluni ásannar, at tað er ógvuliga óheppið, at stevnurnar skulu fella samstundis, og skilir hann væl, at fólkini hinumegin fjørðin vísa ónøgd.

– Tað er óheppið, at tað er stevna á øllum fjørðinum, um tú kanst siga tað soleiðis. Tað merkir fíggjarligan miss fyri báðar partar, tí tað verður minni til tann einstaka. Vit fáa ikki gjørt meira við tað sum er nú, men vit vóna, at hetta fer at broytast, og at man kann tosa um tingini, sigur Anfinn Gærdum, sum leggur afturat, at tað er alt annað enn uppbyggjandi at klandrast.

– Í seinasta enda er tað pengar, sum tað snýr seg um.

## Fíggjarligan týdning

Tað er ongin loyna, at stevnurnar kring landið hava stóran fíggjarligan týdning fyri feløgini, sum standa aftanfyri tær. Og soleiðis er tað eisini við fjarðastevnuni.

– Fíggjarliga er tað ógvuliga týdningarmikið fyri Stráluna og StÍF at hava eina stevnu. Á henda hátt ber til hjá okkum at savna pengar uppá eitt vikuskifti, tí tað skulu nógvir pengar til at reka eitt felag.

Restina av árinum skipar Strálan millum annað fyri lutaseðlasølu, sjavs, bingo og eisini dansi. Men seinastu tíðina hevur ikki verið so nógv gjørt burturúr dansinum, og vónar formaðurin, at hetta fer at taka seg uppaftur nú.

– Strandingar eru ógvuliga spentir uppá stevnuna, og teir hava tikið væl undir við henni. Tað skulu nógv fólk til at fáa eina stevnu at hanga saman, og serliga nú, skotbráðið er so stutt. Tá er tað ikki bara bara.

Kappróðurin verður í dag, leygardag, klokkan 15. Um alt gongur eftir ætlan og veðrið vil tað sama sum fyrireikararnir og róðrarfólkið, væl at merkja.

Strálan varð sett á stovn í 1989, og bátin fingu tey í 1991. Talan er um seksmannafar, og dreingirnir í felagnum gjørdust meistarar tað árið og aftur í 2000.

– Dreingirnir hava stóran áhuga fyri kappróðri, men tað er truplari við gentumanningunum. Tað hevði frá felagnum verið ynskiligt, at fingið eitt fimmmannafar, soleiðis at tey ungu kundu komið við og síðani tikið yvir á seksmannaførunum. Vit hava onki neyst enn, men tað fara vit at byggja nú í nærmastu framtíð, tí tað er uppá tíðina, at felagið fær egið neyst, sigur Anfinn Gærdum at enda.

# Nógv á skránni

**Sangkapping, paintball, kappróður, fjarðateitið, dansur, útimøti og uppboðssøla eru bara nøkur av teimum tiltøkunum, sum verða á Strondum um vikuskiftið**

STEVNA
*Ingrid Bjarnastein*

**Strendur:**
Nú fyrsta fjarðastevnan verður um vikuskiftið, hava strandingar nógv spennandi á skránni til stevnuna.

Sjálv stevnan verður sett leygardagin av Høgna Hoydal við Bygdarhúsið. Fuglafjarðar hornorkestur spælir, og sum vanligt, so verður tivoli eisini.

Næsti FM-róðurin í ár verður klokkan 15 leygardagin, og stórur spenningur er, sum vera man, um henda róðurin.

Fjarðteiti, skemtirógving, Stevnudansur, paintball skjótikapping, uppboðssøla, útimøti og annað eru bara nøkur av teimum tilboðunum, stevnugestirnir kunnu taka av um vikuskiftið.

Millum annað fara Heðin Kambsdal, Frits Johannesen, Eyðun á Reyni og Øssur Mohr at mála hvør sín málning, sum verða seldir á uppboðssølu seinni.

ROK spæla til dans í bygardahúsinum, og skemtirógvingin er uttan iva eina vitjan verd. Tá fara fyritøkur ymsastaðni úr Eysturoynni at rógva kapp í mini-gummibátum.

Stevnan endar sum vanligt sunnudag, og tá verður millum annað togtogan millum sterkar menn av Strondum og Skála, og brotskastkapping fyri børn verður á hondbóltsvøllinum.